


# STØRV Á NÁTTÚRUVÍSINDADEILDINI Á FRÓÐSKAPARSETRINUM

Á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsertinum eru trý størv leys at søkja – tvey skrivstovustørv og eitt laborantstarv.

## DEILDARSKRIVARI

Søkt verður eftir deildarskrivara til Náttúruvísindadeildina. Talan er um fulltíðarstarv.

STARVIÐ
Høvuðsuppgávur tínar verða:

- ábyrgd av dagliga virkseminum á deildarskrivstovuni
- ábyrgd av journalini
- daglig fíggjarfyrisiting á deildini
- fyrireika fundir og skriva fundarfrágreiðingar
- samskifti við studentar og lærarar
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

## SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Náttúruvísindadeildina. Talan er um hálvtíðarstarv.

STARVIÐ
Høvuðsuppgávur tínar verða:

- ábyrgd av skeiðsskránni
- ábyrgd av próvtøkuhaldi
- samskifti við studentar og lærarar
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

FØRLEIKAR TIL BÆÐI STØRVINI
Vit vænta, at tú:

- hevur skrivstovuútbúgving ella samsvarandi royndir
- hevur góðan málkunnleika, serliga í føroyskum
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- ert ábyrgdarfull/ur og røkin
- hevur góð evni at samskifta og samstarva við onnur
- hevur góðan telduførleika
- evni at laga teg til broyttar arbeiðsumstøður

SETANARTREYTIR
Størvini verða sett frá 1. september 2008 ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 3. flokkur.

UMSÓKNIR
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu vera Náttúruvísindadeildini í hendi í seinasta lagi **mánadagin 21. juli 2008.**

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Hans Paula Joensen á tel. 35 25 00 ella á teldupostadressuni hanspj@setur.fo.

## LABORANTUR

Søkt verður eftir laboranti til starvsstovuna á Náttúruvísindadeildini. Talan er um ¾-tíðarstarv.

STARVIÐ
Høvuðsuppgávur tínar verða:

- starvsstovuarbeiði so sum:
  – kemiskar, fysiskar og mikrobiologiskar analysur
  – framleiðsla av reagensum
- viðlíkahald av starvsstovutólum
- heintan av sýnum til kanningar
- faklig vegleiðing av studentum

FØRLEIKAR
Vit vænta, at tú:

- ert laboratoriiteknikari ella laborantur við starvsroyndum
- hevur forkunnleika til gass- og veskuchromatografi eins og metalanalysur
- ert opin fyri førleikamenning
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- ert røkin
- hevur kunnleika til vanlig telduforrit, t.d. Microsoft Office

SETANARTREYTIR
Starvið verður sett frá 1. september 2008 ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 4. flokkur.

UMSÓKNIR
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu vera Náttúruvísindadeildini í hendi í seinasta lagi **týsdagin 5. august 2008.**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hórald Joensen á tel. 35 25 00 ella á teldupostadressuni horaldurj@setur.fo.

**Umsóknir skulu sendast til Náttúruvísindadeildina · Nóatún 3 · Postrúm 2109 · FO 165 Argir.**

Náttúruvísindadeildin

SENDISTOVAN